


*Hópin av bilum við útlendskum nummarplátum uttanfyri hotellini. Her verður Mazda5 presenteraður í Milano*

# Presentatiónir av nýggjum bilum í Føroyum?



*Stóratjørn kundi verið eitt flott umhvørvi til presentatión av nýggjum bilum, eins og til ráðstevnur. Á hotellinum verða umleið 130 kømur, 30 hotellíbúðir, matstovur, fundarhøli og annað. Saman við stóru hotellunum Hotel Føroyar og Hotel Hafnia skuldu vit havt kapasitet til at taka ímóti nógvum gestum*



*Vit hava eitt vakurt land at bjóða fram til presentatiónir av nýggjum bilum.*

**Høvdu flogfør altíð kunnað lent í Føroyum, og hotel-kapasiteturin var munandi størri enn í dag, samstundis sum føroyska veganetið var á fløgu til navigatiónsskipanir, høvdu vit havt møguleika at vunnið nógvan pening upp á presentatiónir av nýggjum bilum**

**BILAR**

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
Myndir: Magnus Gunnarsson



Um vit høvdu ein alternativan flogvøll, soleiðis at flogfør so gott sum altíð kundu lent í Føroyum, hevði tað latið upp fyri nógvum nýggjum møguleikum.

Umframt ráðstevnur av øllum sløgum hevði eisini verið góður møguleiki hjá bilframleiðarum at presenterað síni nýggju bilmodell her. Hetta hevði ført við sær at í túsundatali av fólki, bilforhandlarum, importørum og motorjournalistum høvdu komið higar.

Bilverksmiðjurnar brúka milliardir av krónum til at gera eitt nýtt bilmodell, tí er marknaðarføringin av sera stórum týdningi. Tað gongur soleiðis fyri seg, at tað eru ikki bilverksmiðjurnar sjálvar sum skipa fyri bilpresentatiónunum, men aðrar fyritøkur í Evropa sum átaka sær at skipa fyri og fyrireika hesi stóru tiltøk fyri fleiri túsund fólkum. Um vit skuldu havt bilpresentatiónir í Føroyum, høvdu fólk frá hesum fyritøkum komið higar framman-undan og hugt eftir hvørjir møgu-leikar eru her, og hvat vit hava at bjóða.

Tað er av alstórum týdningi hjá fyriskiparunum, at tað verður ein góð uppliving. Gestirnir skulu búgva væl og uppliva okkurt ið er sermerkt fyri landið. Vit hava eitt vakurt land og góðar vegir til royndarkoyring av nýggjum bilum, bæði til býarkoyring og fjallavegir.

Tað sum vit mangla í løtuni er t.d. størri hotellkapasitet – men tað fáa vit, tá stóra verkætlanina við Stóru-tjørn í Hoyvíkshaganum verður liðug. Brúk er fyri stórum hotelli við øllum hentleikum og møguleika fyri at havt tíðindafundir og presentatiónir av nýggjum bilmodellinum.

Bilarnir verða royndarkoyrdir undir ymiskum koyriumstøðum, alt frá høvuðsvegi til smalar krókutar bygdarvegir og uppi í fjøllunum. Slíkir bilar hava sum oftast navnigatións-skipan. Tá hevði verið smart við okkara egnu fløgu við føroyska veganetinum, so testkoyrararnir uttan trupulleikar kundu koyrt kring landið eftir fastløgdum rutum.

Vit kunnu taka sum dømi, at royndarkoyringin byrjaði í Havn og koyrt varð norður eftir, kanska eftir Oyggjarvegnum. Á onkrum hotelli norðanfyri kundu testkoyrararnir havt ein støðg, har teir fingu frokost